VÁGA KOMMUNA

# Reglugerð fyri dagstovnar í Vága kommunu

§ 1

**Kommunalir stovnar**

Dagstovnarnir í Vága kommunu eru kommunalir stovnar, ið eru góðkendir við heimild í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt nr. 67 frá 10. mai 2000 við seinni broytingum. Stovnarnir eru skyldugir til at vera undir almennum eftirliti og fylgja teimum umsitingarligu fyriskipanum, ið eru ásettar sambært somu lóg.

2. stk.
Stovnarnir eru fyri børn undir skúlaaldur.

§2

**Endamálið hjá stovnunum**

1. stk.
Endamálið hjá stovnunum er yrkadagar við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling sambært dagstovnalógini § 2.

2. stk.
Javnstillað við 1. stk. er endamálið hjá stovnunum at samskipa tiltøk fyri børn, sum av fysiskum, sálarligum og/ella sosialum orsøkum hava tørv fyri meiri stuðuli enn tí, sum heimið megnar at geva.

§3

**Foreldraráð**

1. stk.
Fyri hvønn stovn skal veljast eitt foreldraráð. Ráðið skal arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið ímillum foreldrini, stovnin og kommununa.

2. stk.
Leiðarin tekur stig til, at eitt ráð verður valt. Í ráðnum skulu vera 5 limir, sum verða valdir fyri tvey ár ísenn. Fyri hvønn lim verður ein varalimur valdur.

3. stk.
Ráðið skal verða umboðað av foreldrum/verjum, sum hava børn á stovninum.

4. stk.
Kommunustýrið ger viðtøkur fyri virksemi ráðsins.

5. stk.
Leiðarin skal møta á árliga foreldrafundinum.

§4
**Setanarviðurskifti og uppgávubýti**

1. stk.
Til tess at røkja dagligu leiðslu stovnsins, setir kommunustýrið ein leiðara við námsfrøðiligari útbúgving.
Vága kommuna setir, eftir tilmæli frá leiðaranum, fólk í starv.
Eisini loysir kommunan fólk úr starvi eftir tilmæli frá leiðaranum
Vága kommuna skal lýsa størvini alment leys.
Fólk, sum verða sett í starv eftir hesi reglugerð, verða lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi yrkisfelag.

2. stk.
Stovnarnir hava opið yrkadagar. Børn hava ikki loyvi at verða á stovni meira enn 9 tímar um dagin.
Stovnarnir verða stongdir 4 vikur um summarið, tó soleiðis, at um onkur hevur serstakan tørv á ansing, ber til at gera avtalur um tað við leiðaran innan 1. mai.
Barnið skal vera í feriu minst 4 vikur um árið.
Stovnarnir hava stongt millum jól og nýggjár.

3. stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av námsfrøðiligu leiðslu stovnsins og stendur fyri dagliga rakstrinum í samstarvi við kommununa.

4. stk.
Kommunustýrið ger upptøkureglur, sum skulu góðkennast av landstýrismanninum sambært § 4, 2. stk. í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

5. stk.
Kommunan hevur ábyrgdina av, at foreldragjaldið verður kravt. Leiðarin førir í samstarvi við annað starvsfólk hjáverubók, har tað hvønn dag verður sagt frá, hvørji børn eru komin.

6. stk.
Leiðarin førir høvuðsbók við upplýsingum um tey børn, ið eru á stovninum, navn teirra og aldur, foreldur/verjar og hvussu leingi tey vóru á stovninum, og um orsøkina til, at tey fóru av stovninum.

7. stk.
Leiðarin skipar fyri arbeiðsætlanum, frítíðarætlanum, sjúkraseðlum o.s.fr.

8. stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av, at óregluligar avgerðir ikki verða tiknar á stovninum.
Um kommunustýrið tekur avgerð, ið eftir uppfatan leiðarans er í stríð við galdandi reglur so sum sáttmála og tílíkt, hevur leiðarin skyldu til at boða kommunustýrinum frá hesum.
Um kommunustýrið ikki er samt við leiðaran hesum viðvíkjandi, kann avgerð kommunustýrisins kærast til Mentamálaráðið.

VÁGA KOMMUNA

§5
**Fíggjarætlan**

1. stk.
Tað áliggur leiðaranum, saman við kommunalu fyrisitingini, at gera uppskot til fíggjarætlan, sum verður løgd fyri kommunustýrið til viðmerkingar og góðkenningar.

2. stk.
Er talan um størri útreiðslur, sum ikki eru innan fyri góðkenda fíggjarætlan, skulu útreiðslurnar ikki berast uttan góðkenning frá kommunustýrinum.
Keypt skal ikki vera, fyrr enn tilboð eru fingin til vega og løgd fyri kommunustýrið til støðutakan.

§6
**Eftirstøða**

Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta fríplássi, sambært kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt nr. 84 frá 7 oktober 1999.

§7
**Royking/rúsevni**

Øll royking/rúsevni er bannað inni á stovnunum og á økjunum, sum hoyra til stovnarnar.

§8
**Kærumøguleikar**

Avgerðir, tiknar sambært hesi reglugerð, kunnu, innan 4 vikur eftir at kærari skrivliga hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Mentamálaráðið.

Kommunustýrið kann broyta hesa reglugerð.

Henda reglugerð er samtykt á kommunustýrisfundi tann 23. oktober 2013

**Vága kommunustýri**

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari